# Kunngerðablaðið A

2011 Hefti 23

ISSN 0907-905X


Nr. 74 6. juni 2011

**Løgtingslóg**
**um**
**serstakar treytir fyri makrelfiskiskapi í 2011**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

*Øki*

**§ 1.** Henda løgtingslóg fevnir um serstakar treytir fyri fiskiskapin eftir makreli (Scomber scombrus) við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2011, sbr. tó § 8.

*Avgjald*

**§ 2.** Avgjald verður lagt á 66.450 tons av makrelkvotuni fyri 2011. Eigari av fiskifari undir føroyskum flaggi, ið fær rætt til at fiska av nevndu kvotu, skal rinda eitt avgjald, sum er kr. 0,25 fyri hvørt fiskað kilo, roknað í rundari vekt. Avgjaldið fer í landskassan.
*Stk. 2.* Tað í stk. 1 nevnda avgjald fellur til gjaldingar so hvørt, veiðan er avreidd.
*Stk. 3.* Tá fiskifør avreiða til keypara í Føroyum, her uppií um uppboðssølu, hevur keypari ella uppboðssøla skyldu at afturhalda avgjaldið, ið er ásett í stk. 1, og rinda hetta til landskassan.
*Stk. 4.* Tá fiskifør avreiða til keypara í útlandinum, skal eigarin av fiskifarinum rinda avgjaldið til landskassan.
*Stk. 5.* Keypari og eigari av fiskifari hava skyldu til at lata Fiskiveiðieftirlitinum avreiðingarseðlar og søluskjøl skjótast møguligt og í seinasta lagi 14 dagar eftir avreiðing.
*Stk. 6.* Fiskiveiðieftirlitið ger upp avgjaldið og sendir rokning mánaðarliga.
*Stk. 7.* Gjaldsfreistin er 10 dagar eftir dagfesting á faktura.
*Stk. 8.* Rinda tey gjaldskyldugu ikki rættstundis, skal renta rindast við 1% fyri hvønn byrjaðan mánað. Avgjaldið, umframt renta og møguligur innkrevjingarkostnaður av hesum, kann krevjast inn við panting. TAKS fremur panting eftir reglunum um innkrevjing av skattum.

*Uppboðssøla*

**§ 3.** Heimilað verður landsstýrismanninum í 2011 at selja rættin at veiða 20.000 tons av makreli á uppboðssølu til eigarar av fiskiførum undir føroyskum flaggi. Henda kvotan er ikki fevnd av tí í § 2, stk. 1

í hesi lóg nevnda avgjaldi. Inntøkan frá søluni fer í landskassan.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin letur keypara kvotuna í fiskiloyvi sbrt. § 5, stk. 4 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap. Kvotan verður latin sum egin árskvota og kann, fyri árið 2011, avhendast til eigara av fiskifari undir føroyskum flaggi eftir mannagongdunum í § 15, stk. 4 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð, hvussu uppboðssølan fer fram, herundir, um kvotan verður seld í einum, ella hon verður seld so líðandi í serium, undir hvørjum treytum sølan fer fram og um gjaldstreytir. Keyparin ber sølukostnaðin.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann gera avtalu við ein uttan fyri standandi veitara, at hesin stendur fyri uppboðssøluni.

*Kvota til vísindaligar kanningar og granskingarroyndir*

**§ 4.** Landsstýrismanninum er heimilað at lata fiskifari kvotu av makreli sum samsýning fyri, at fiskifar ger vísindaligar kanningar og granskingarroyndir fyri Havstovuna. Henda kvotan er ikki fevnd av tí í § 2, stk. 1 í hesi lóg nevnda avgjaldi.

*Stk. 2.* Tá kvota verður latin fiskifari sbrt. stk. 1, skal henda verða latin á ein hátt, sum leggur upp fyri, at eitt rímiligt samsvar er millum mett virði á kvotuni og eina meting av, hvat tað kostar fiskifarinum at gera granskingarroyndir fyri Havstovuna.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin letur eigara av fiskifari kvotuna í fiskiloyvi sbrt. § 5, stk. 4 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap. Kvotan verður latin sum egin árskvota og kann, fyri árið 2011, avhendast til eigara av fiskifari undir føroyskum flaggi eftir mannagongdunum í § 15, stk. 4 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

*Treytir til manning*

**§ 5.** Manning á fiskiførum undir føroyskum flaggi, sum fáa fiskiloyvi at fiska makrel í 2011, skal verða lønt samsvarandi sáttmálum, sum eru galdandi á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

*Eygleiðarar*

**§ 6.** Landsstýrismaðurin kann áleggja førum, sum taka ímóti makreli, at hava umborð eygleiðarar frá Fiskiveiðieftirlitinum at gera kanningararbeiði í sambandi við fiskiveiðu eftir makreli við fiskiførum undir føroyskum flaggi í føroyskum sjógvi. Útreiðslur til kost og uppihald ber farið, sum tekur ímóti makreli. Landsstýrismaðurin kann harumframt áleggja førum, sum taka ímóti makreli, at bera lønarkostnaðin. Eygleiðarar hava loyvi at nýta samskiftisútgerðina umborð til tess at hava samband við myndugleikar á landi og við Fiskiveiðieftirlitið.

*Annað*

**§ 7.** Kvota, sum avgjald verður lagt á sbrt. § 2 í hesi lóg, kvota, sum verður seld sbrt. § 3 í hesi lóg, og kvota, sum verður latin fyri at gera rannsóknir og granskingarroyndir fyri Havstovuna sbrt. § 4 í hesi lóg, er bert galdandi fyri árið 2011. Kvoturnar geva ikki rættindi sbrt. § 13, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap og kunnu ikki avhendast endaliga sbrt. § 15 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

**§ 8.** Hóast ásetingarnar í hesi lóg og løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, kann landsstýrismaðurin loyva eigara av fiskifari undir føroyskum flaggi at fiska makrel í 2011 við fiskifari undir fremmandum flaggi, tá tað skal nýtast fyri fiskifar undir føroyskum flaggi, sum orsakað av bráðfeingis óhappi ikki kann fara til fiskiskap.

*Stk. 2.* Tá talan er um leigað fiskifar undir fremmandum flaggi, sum fær loyvi at fiska makrel í 2011, sambært stk. 1 í hesi grein, eru rættindi og skyldur eigarans í § 2, stk. 1, § 2, stk. 4, § 2, stk. 5, § 3, stk. 2, § 4, stk. 3, § 5 og § 6 at skilja sum rættindi og skyldur leigarans.

*Stk. 3.* Í teimum førum, fiskifar undir fremmandum flaggi kemur inn fyri fiskifar undir føroyskum flaggi, sbrt. stk. 1, kann landsstýrismaðurin selja leigaranum av fiskifarinum undir fremmandum flaggi rætt av veiða makrel í 2011 sbrt. § 3, stk. 1 í hesi lóg.

**§ 9.** Í tann mun, henda lóg ikki hevur serligar ásetingar, so er løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap við tilhoyrandi kunngerðum galdandi.

*Revsing*

**§ 10.** Um ikki harðari revsing er ásett eftir aðrari lóg, verður tann revsaður við bót, ið brýtur § 2, stk. 3 og 5. Á sama hátt verða eigari av fiskifari undir føroyskum flaggi, og leigari av fiskifari undir fremmandum flaggi, sum kemur inn fyri fiskifar undir føroyskum flaggi sbrt. § 8, revsaðir við bót, um hesir bróta ásetingina í § 5.

*Stk. 2.* Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum sambært reglunum í 5. kapitli i revsilógini.

*Gildiskoma o.a.*

**§ 11.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2011.

Tórshavn, 6. juni 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 200/2010

# Eykajáttanarløgtingslóg

# fyri

# mai 2011

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

## § 3. Fíggjarmál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -6.532 | -7.532 | -1.000 |
| Løgu ætlan | - | - | - |
| **Fíggjarmál o.a.** | | **68** | **-** |
| 3.15.1. Fíggjafyrisiting v.m ........................................ | | 68 | - |
| **Almannamál** | | **-600** | **-** |
| 3.21.2. Útgjaldsskipanir.............................................. | | -600 | - |
| **Íbúðarmál** | | **-7.000** | **-2.000** |
| 3.22.4. Útgjaldsskipanir.............................................. | | -7.000 | -2.000 |
| **Útbúgving og gransking** | | **-** | **1.000** |
| 3.23.2. Fólkaskúlin v.m. .............................................. | | - | 1.000 |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - |
| **3.15.1. Fíggjafyrisiting v.m.** | | | |
| 15.1.13. Búskaparráðið (Rakstrarj.) | J: | 182 | - |
| | **EYJ:** | **68** | **-** |
| **3.21.2. Útgjaldsskipanir** | | | |
| 21.2.01. Stuðul til flutning og dupult húsarhald (Lógarbundin j.) | J: | 17.000 | - |
| | **EYJ:** | **-600** | **-** |
| **3.22.4. Útgjaldsskipanir** | | | |
| 22.4.01. Stuðul til rentuútreiðslur (Lógarbundin j.) | J: | 135.000 | 48.000 |
| | **EYJ:** | **-7.000** | **-2.000** |
| **3.23.2. Fólkaskúlin v.m.** | | | |
| 23.2.07. Læraraeftirlønir (Lógarbundin j.) | J: | 55.000 | 21.500 |
| | **EYJ:** | **-** | **1.000** |

# § 5. Fiskivinnumál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 3.300 | 3.300 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **-100** | **-** |
| 5.11.1. Fyrisiting ......................................................... | | -100 | - |
| **Fiskivinna** | | **3.400** | **-** |
| 5.34.2. Tænasta og eftirlit........................................... | | 3.400 | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - |
| **5.11.1. Fyrisiting** | | | |
| 11.1.05. Fiskimálaráðið (Rakstrarj.) | J: | 13.599 | - |
| | **EYJ:** | **-100** | **-** |
| **5.34.2. Tænasta og eftirlit** | | | |
| 34.2.05. Fiskiveiðieftirlit (Rakstrarj.) | J: | 14.000 | - |
| | **EYJ:** | **3.400** | **-** |

# § 6. Vinnumál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 8.884 | 9.109 | 225 |
| Løgu ætlan | - | - | - |
| **Ráevnisvinna** | | **-** | **225** |
| 6.32.1. Fyrisiting ........................................................ | | - | 225 |
| **Handil og vinna annars** | | **509** | **-** |
| 6.37.1. Ymsar útreiðslur .............................................. | | - | - |
| 6.37.2. Ymiskur studningur ........................................ | | 509 | - |
| **Samferðsla og samskifti** | | **8.600** | **-** |
| 6.38.2. Samferðsla ...................................................... | | 8.600 | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - |
| **6.32.1. Fyrisiting** | | | |
| 32.1.04. Søla av seismiskum kanningarúrslitum (Stuðulsj.) | J: | - | - |
| | **EYJ:** | **-** | **225** |
| **6.37.2. Ymiskur studningur** | | | |
| 37.2.04. Endurgjald til skipasmíð (Stuðulsj.) | J: | 500 | - |
| | **EYJ:** | **509** | **-** |
| **6.38.2. Samferðsla** | | | |
| 38.2.01. Strandfaraskip landsins (Rakstrarj.) | J: | 125.146 | - |
| | **EYJ:** | **7.000** | **-** |
| 38.2.04. Tyrlutænastan (Rakstrarj.) | J: | 6.600 | - |
| | **EYJ:** | **1.600** | **-** |

# § 7. Mentamál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 2.500 | 2.500 | - |
| Løgu ætlan | -2.000 | -2.000 | - |
| **Útbúgving og gransking** | | **-3.500** | **-** |
| 7.23.2. Fólkaskúlin v.m. ............................................ | | 1.500 | - |
| 7.23.3. Miðnámsútbúgvingar..................................... | | -2.000 | - |
| 7.23.6. Hægri útbúgvingar og | | 500 | - |
| 7.23.7. Lestrarstuðul.................................................. | | -3.500 | - |
| **Mentan** | | **4.000** | **-** |
| 7.24.1. Ymsar útreiðslur ............................................ | | - | - |
| 7.24.6. Ítróttur............................................................. | | 4.000 | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - |
| **7.23.2. Fólkaskúlin v.m.** | | | |
| 23.2.01. Fólkaskúlin (Rakstrarj.) | J: | 280.101 | - |
| | **EYJ:** | **1.500** | **-** |
| **7.23.3. Miðnámsútbúgvingar** | | | |
| 23.3.09. Skúladepil við Marknagil (Løguj.) | J: | 38.500 | - |
| | **EYJ:** | **-2.000** | **-** |
| **7.23.6. Hægri útbúgvingar og gransking** | | | |
| 23.6.16. Fróðskaparsetur Føroya (Rakstrarj.) | J: | 70.477 | - |
| | **EYJ:** | **1.000** | **-** |
| 23.6.24. ES-granskingarskrá (Stuðulsj.) | J: | 8.500 | - |
| | **EYJ:** | **-500** | **-** |
| **7.23.7. Lestrarstuðul** | | | |
| 23.7.04. Lestrarstuðul (Lógarbundin j.) | J: | 120.282 | 600 |
| | **EYJ:** | **-3.500** | **-** |
| **7.24.6. Ítróttur** | | | |
| 24.6.16. Langhylur í Vági | J: | - | - |
| | **EYJ:** | **4.000** | **-** |

# § 11. Heilsumál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -247 | -247 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **-** | **-** |
| 11.11.1. Fyrisiting ........................................................ | | - | - |
| **Heilsumál** | | **-417** | **-** |
| 11.20.2. Heilsutænastur ................................................ | | 760 | - |
| 11.20.3. Sjúkrahúsverkið ............................................ | | 153 | - |
| 11.20.4. Viðgerðarstovnar ............................................ | | 190 | - |
| **Almannamál** | | **170** | **-** |
| 11.21.3. Barnastuðul .................................................... | | 170 | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **11.20.2. Heilsutænastur** | | | |
| 20.2.04. Kommunulæknaskipanin (Rakstrarj.) | J: | 10.513 | - |
| | **EYJ:** | **-760** | **-** |
| **11.20.3. Sjúkrahúsverkið** | | | |
| 20.3.10. Klaksvíkar sjúkrahús (Rakstrarj.) | J: | 62.323 | - |
| | **EYJ:** | **-141** | **-** |
| 20.3.15. Suðuroyar sjúkrahús (Rakstrarj.) | J: | 50.541 | - |
| | **EYJ:** | **-106** | **-** |
| 20.3.30. Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu (Rakstrarj.) | J: | 1.658 | - |
| | **EYJ:** | **400** | **-** |
| **11.20.4. Viðgerðarstovnar** | | | |
| 20.4.02. Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (Rakstrarj.) | J: | 5.030 | - |
| | **EYJ:** | **95** | **-** |
| 20.4.03. Viðgerðarstovnurin Blákrossheimið (Rakstrarj.) | J: | 5.030 | - |
| | **EYJ:** | **95** | **-** |
| **11.21.3. Barnastuðul** | | | |
| 21.3.12. Gigni - heilsufrøði fyri børn & ung (Rakstrarj.) | J: | 11.105 | - |
| | **EYJ:** | **170** | **-** |

# § 12. Almannamál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -253 | -253 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |
| **Almannamál** | | **-253** | **-** |
| 12.21.6. Eldri og brekað............................................... | | -253 | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - |
| **12.21.6. Eldri og brekað** | | | |
| 21.6.01. Serforsorg (Rakstrarj.) | J: | 172.903 | - |
| | **EYJ:** | **-500** | **-** |
| 21.6.04. Eldrarøkt (Rakstrarj.) | J: | 330.526 | - |
| | **EYJ:** | **247** | **-** |

# § 15. Innlendismál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 500 | 500 | - |
| Løgu ætlan | -2.000 | -2.000 | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **500** | **-** |
| 15.11.1. Fyrisiting ....................................................... | | 500 | - |
| **Lógarmál** | | **210** | **-** |
| 15.14.1. Ymiskar útreiðslur ......................................... | | 210 | - |
| **Samferðsla og samskifti** | | **-2.210** | **-** |
| 15.38.1. Vegir og havnir ............................................... | | -3.210 | - |
| 15.38.2. Samferðsla...................................................... | | 1.000 | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **15.11.1. Fyrisiting** | | | |
| 11.1.39. Innlendismálaráðið (Rakstrarj.) | J: | 10.330 | - |
| | **EYJ:** | **500** | **-** |
| **15.14.1. Ymiskar útreiðslur** | | | |
| 14.1.01. Ymsar útreiðslur (Rakstrarj.) | J: | 1.000 | - |
| | **EYJ:** | **210** | **-** |
| **15.38.1. Vegir og havnir** | | | |
| 38.1.07. Nýggir landsvegir (Løguj.) | J: | 43.500 | 100 |
| | **EYJ:** | **-3.000** | **-** |
| 38.1.18. Stuðul til infrakervið á útoyggjum (Stuðulsj.) | J: | 2.500 | - |
| | **EYJ:** | **-210** | **-** |
| **15.38.2. Samferðsla** | | | |
| 38.2.13. Flogferðsla (Løguj.) | J: | 2.000 | - |
| | **EYJ:** | **1.000** | **-** |

# § 20. Inntøkur

## A. Yvirlit

| *Játtanar yvirlit* | | | |
|---|---|---|---|
| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
| Útreiðsluætlan | -25.800 | - | 25.800 |
| Løgu ætlan | - | - | - |
| **Skattir og avgjøld** | | **-** | **25.800** |
| 20.52.2. Avgjøld og tollur........................................... | | - | 15.800 |
| 20.52.3. Ymsar inntøkur ............................................ | | - | 10.000 |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - |
| **20.52.2. Avgjøld og tollur** | | | |
| 52.2.15. Avgjald á fiskatilfengi | J: | - | - |
| | **EYJ:** | **-** | **15.800** |
| **20.52.3. Ymsar inntøkur** | | | |
| 52.3.05. Uppboðsøla av fiskatilfengi | J: | - | - |
| | **EYJ:** | **-** | **10.000** |

Tórshavn, 6. juni 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 195/2010

Nr. 76 7. juni 2011

## Løgtingslóg
## um
## bygging av nýggjum havrannsóknarskipi

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at gera avtalur um bygging av nýggjum havrannsóknarskipi.

*Stk. 2.* Byggiútreiðslurnar fyri skipið kunnu í mesta lagi verða 200 mió. kr.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2015.

Tórshavn, 7. juni 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 201/2010

Nr. 77 7. juni 2011

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 129 frá 22. desember 2008 um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 verður „150 mió. kr.“ broytt til: „421,8 mió. kr.“.

2) Í § 2 verður „2012“ broytt til: „2018“.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 7. juni 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 82/2010

Nr. 78 7. juni 2011

**Løgtingslóg**
**um**
**bygging av sambýli í Tórshavn til fólk við sálarsjúku**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at fara undir at byggja eitt sambýli í Tórshavn til fólk við sálarsjúku. Útreiðslurnar til verkætlanina kunnu í mesta lagi vera 16,3 mió. kr.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2013.

Tórshavn, 7. juni 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 91/2010

Nr. 79 7. juni 2011

**Løgtingslóg**
**um**
**bygging av stovni í Eysturoynni til børn við fjølbreki**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at fara undir at byggja ein stovn í Eysturoynni til børn við fjølbreki. Útreiðslurnar til verkætlanina kunnu í mesta lagi vera 26,5 mió. kr.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2014.

Tórshavn, 7. juni 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 90/2010

Nr. 80 7. juni 2011

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at byggja skúladepil í Tórshavn

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunngerløgmaður hesa løgtingslóg:

### § 1

Í løgtingslóg nr. 43 frá 26. mai 2008 um at byggja skúladepil í Tórshavn, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 4 verður: „um býtið av samlaða fíggjarkarminum upp á ár" strikað.

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 7. juni 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 141/2010

Nr. 81 7. juni 2011

## Løgtingslóg um at byggja vardar bústaðir í Norðoyggjum og Eysturoy til fólk við serligum tørvi

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunngerløgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at fara undir at byggja vardar bústaðir í Norðoyggjum og í Eysturoy til fólk við serligum tørvi.

*Stk. 2.* Útreiðslurnar til báðar verkætlanirnar kunnu í mesta lagi vera 33 mió. kr. tilsamans.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2013.

Tórshavn, 7. juni 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 194/2010

Nr. 82 7. juni 2011

# Løgtingslóg
# um
# Búskapargrunn Føroya

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

*Endamál*

**§ 1.** Henda lóg skipar Búskapargrunn Føroya, ið skal tryggja búskaparligu áhugamál Føroya fólks, tá ræður um at nýta serinntøkur landsins, og skal nýtast sum amboð at røkka einum sjálvberandi búskapi, við:

a) at tálma sveiggjum í føroyska búskapinum
b) at tryggja samfelagnu og landskassanum gott lánføri

*Inntøkur grunsins*

**§ 2.** Serinntøkur landsins verða settar til síðis á fíggjarlóg og roknskapi landsins á serstaka kontu, nevnd Búskapargrunnur Føroya.

*Stk. 2.* Serinntøkur eru:

a) Tilfeingisgjøld av einhvørjum slagi, t.d. av kolvetni, fiski, aliøkjum ella jørð,
b) ágóða av einskiljing landsins,
c) játtan av fíggjarlóg,
d) inntøku av íløgurøkt grunsins.

*Útgjaldskipan*

**§ 3.** Úr Búskapargrunni Føroya verða gjøld flutt til landskassan sambært ásetingunum í stk. 2, 3 og 4.

*Stk. 2.* 50% av serinntøkunum sambært § 2 verða goldin grunninum sum eginpeningur, meðan hini 50% verða útgoldin landskassanum yvir 5 fylgjandi ár í eins stórum pørtum. Hetta er tó ikki galdandi fyri tilfeingisgjald av kolvetni, har 100% verður goldið grunninum sum eginpeningur.

*Stk. 3.* Tá ið eginpeningur grunsins er størri enn ein tíggjundapart av BTÚ, letur grunnurin landskassanum miðal realvinningin av íløgurøktini fyri 4 av seinastu 5 árunum.

*Stk. 4.* Grunnurin letur ikki landskassanum onnur gjøld ella skatt.

*Umsitingarlig viðurskifti*

**§ 4.** Eginpeningur verður sett í virðisbrøv á fíggjarmarknaðinum eftir almennum leiðreglum um størst møguligan vinning við atliti til spjaðing av váða.

**§ 5.** Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum stendur fyri og rindar umsiting av Búskapargrunni Føroya sum serliga roknskaparliga eind við egnari eginogn. Grunnurin er ogn landskassans. Broytingar í eginogn grunsins verða bert roknaðar sum broytingar í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um røkt av fæ grunsins. Landsstýris-maðurin ger av, hvør stovnur skal umsita grunnin.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin leggur fyri Løgtingið uppskot til samtyktar um leiðreglur fyri íløguvirksemi hjá grunninum.

*Stk. 4.* Gjørdur verður serligur eindarroknskapur fyri búskapargrunnin.

*Gildiskoma*

**§ 6.** Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

*Stk. 2.* Lógin fær virknað fyri alt árið 2011, ið skal vera fyrsta roknskaparár grunsins.

Tórshavn, 7. juni 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 184/2010

Nr. 83 7. juni 2011

# Kunngerð um løgujáttan

Við heimild í § 27, nr. 6 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan, verður ásett:

## Kapittul 1 Virkisøki

**§ 1.** Løgujáttan verður brúkt í sambandi við bygging, ognan ella avhending av bygningum, løgum og skipum o.ø. og í sambandi við stór viðlíkahaldsarbeiði, sbrt. § 22, stk. 1 í lógini.

**§ 2.** Stuðul og lán til løguverkætlanir verða tikin við sum stuðulsjáttan ella lógarbundin játtan, alt eftir rættargrundarlagnum.

## Kapittul 2 Løguútreiðslur

**§ 3.** Løguverkætlanir mugu ikki setast í verk, fyrrenn játtan er fingin til vega, umframt at avvarðandi myndugleiki hevur góðkent verkætlanina og samlaðu løguupphæddina.
*Stk. 2.* Samlaða løguupphæddin skal fata um allar útreiðslur fyri, at løgan eftir ætlan kann takast í nýtslu, herundir innbúgv, størri útgerð og uttanumøkið.

**§ 4.** Størri løguverkætlanir upp á 10 mió. kr. ella meira, skulu gerast við grundarlagi í eini verklagslóg.
*Stk. 2.* Við heimild í ásettu samlaðu løguupphæddini í verklagslógini, kann landsstýrismaðurin gera avtalur, sum hava við sær byggiútreiðslur í komandi fíggjarárum, um so er, at hetta er neyðugt fyri at gera skynsamar sáttmálar við atliti at valda útbjóðingar- og byggiháttinum, og treytað av, at tann samlaða løguupphæddin verður hildin.

**§ 5.** Við átekning kann verða givin heimild at flyta óbrúktar løgujáttanir til seinni fíggjarár, sbrt. § 22, stk. 2 í lógini.

**§ 6.** Í viðmerkingunum til løgujáttan skal vera ein frágreiðing um tað ávísu løguverkætlanina og upplýsingar um samlaðu løguupphæddina, við útreiðslunum liðaðar á fíggjarár, sbrt. § 22, stk. 3 í lógini.

**§ 7.** Landsstýrismaðurin er ikki bundin av sundurgreiningini av fleiri løguverkætlanum undir somu høvuðskontu, treytað av, at samlaða løguupphæddin av einstøku verkætlanunum ikki verður broytt og farið ikki verður upp um játtanina.
*Stk. 2.* Er talan um atgerðir, sum bera í sær munandi broytingar í einstøku verkætlanini og atgerðir, sum bera í sær eina hækking av samlaðu løguupphæddini fyri einstøku verkætlanina, kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, vegna avvvarðandi landsstýrismann, ráðføra seg við fíggjarnevnd Løgtingsins um broyttar fortreytir fyri játtanini.
*Stk. 3.* Er talan um nýggjar løguverkætlanir, sum ætlanin er at fremja undir somu høvuðskontu, men sum ikki eru lýstar í viðmerkingunum til løgujáttanina, kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, vegna avvarðandi landsstýrismann, ráðføra seg við fíggjarnevnd Løgtingsins um broyttar fortreytir fyri játtanini.

## Kapittul 3 Løguinntøkur

**§ 8.** Løguinntøkur kunnu bert verða havdar, um so er, at heimild er fyri hesum á fíggjarlóg. Um ikki, skal játtan verða fingin til vega, áðrenn avhending av løgu kann verða framd.
*Stk. 2.* Viðmerkingar til inntøkujáttanir skulu lýsa grundarlagið undir inntøkumetingum, sbrt. § 22, stk. 4 í lógini.

**§ 9.** Bygningar, løgur og skip o.a. kunnu ikki avhendast, fyrrenn hesi hava verið lýst alment til sølu.

## Kapittul 4 Ígildiskoma

**§ 10.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. juli 2011

Fíggjarmálaráðið, 7. juni 2011

**Aksel V. Johannesen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Atli Suni Leo

# Kunngerð
# um
# rakstrarjáttan

Við heimild í § 27, nr. 2-5 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan verður ásett:

## Kapittul 1
## Virkisøki

**§ 1.** Rakstrarjáttan verður brúkt , tá ið endamálið við játtanini fyrst og fremst verður rokkið við virksemi, sum fevnir um at seta starvsfólk og at halda útreiðslur í hesum sambandi, herímillum at keypa vørur og tænastur, útvega tilfar og rakstur av bygningum landsins, sbrt. § 15 í lógini.
*Stk. 2.* Smáar stuðulsveitingar kunnu takast við undir rakstrarjáttan, um hesar eru nær tengdar at vanliga rakstrarvirkseminum.
*Stk. 3.* Inntøkur, sum stava frá gjøldum og avgjøldum til ávís endamál, og sum ikki verða roknað sum skattur, verða tiknar við undir rakstrarjáttan, sbrt. § 8.
*Stk. 4.* Útreiðslur til fyrireikandi kanningar, herundir tørvsmetingar, viðvíkjandi løguverkætlan, kunnu verða tiknar við undir rakstrarjáttan. Útreiðslur til framhaldandi fyrireikingararbeiði og projekteringsútreiðslur krevja serstaka løgujáttan.
*Stk. 5.* Útreiðslur til KT-verkætlanir verða tiknar við undir rakstrarjáttan.
*Stk. 6.* Í ivamálum er tað landsstýrismaðurin í fíggjarmálum sum ger av, um ávís inntøka ella útreiðsla skal takast við undir rakstrarjáttan ella annað játtanarslag, sbrt. § 14, stk. 3, í lógini.

**§ 2.** Undir gjøllari ásettum treytum kann serstakt virksemi verða tikið við undir rakstrarjáttan, útgreinað sum landsfyritøka, inntøkufíggjað virksemi ella stuðulsfíggjað virksemi. Reglurnar hesum viðvíkjandi eru at finna í kapittlunum 5-7.

**§ 3.** Tað er ikki loyvt at gera avtalur um langtíðarleigu. Langtíðarleiga er í hesi merking, at váðar og fyrimunir, sum eru tengdir at ognarrættinum til ognina, verða fluttir frá útleigara til leigara. Í hesum føri er langtíðarleiga at rokna sum eitt keyp og skal verða viðgjørt samsvarandi.
*Stk. 2.* Tó kunnu avtalur um langtíðarleigu verða gjørdar, um landsstýrismaðurin í fíggjarmálum metir, at slíkar avtalur hava munandi og eyðsýndar fyrimunir fyri landið.

**§ 4.** Landsstýrismaður kann gera avtalur, sum hava útreiðsluvirknað í seinni fíggjarárum, um tað er ein nátturlig fortreyt fyri einum skynsamum og framhaldandi rakstri, so sum avtalur um setanarviðurskifti, sáttmálar um húsaleigu, tænastusáttmálar, og loyvdar avtalur um langtíðarleigu, sbrt. § 17 í lógini.

**§ 5.** Rakstrarjáttan verður játtað á høvuðskontustigi, sum er sundurliðað í undirkontur, herundir standardkontur. Henda sundurgreining er ikki bindandi, men vegleiðandi.
*Stk. 2.* Rakstrarjáttan verður í fíggjarlógini sett upp sum nettoútreiðslujáttan. Er inntøkan hægri enn ætlað, kunnu verða hildnar fleiri útreiðslur, verður ikki farið út um nettoútreiðslujáttanina. Er inntøkan minni enn ætlað, hevur hetta við sær, at útreiðslurnar skulu skerjast samsvarandi, sbrt. § 16, stk. 1, í lógini.
*Stk. 3.* Hóast rakstrarjáttan er ein nettoútreiðslujáttan, verða inntøkur og útreiðslur settar upp fyri seg í viðmerkingunum til játtanina (bruttoskrásetingarmeginreglan), um ikki landsstýrismaðurin í fíggjarmálum gevur loyvi til at víkja frá meginregluni, sbrt. § 16, stk. 2, í lógini.
*Stk. 4.* Inntøkur, sum verða tiknar við undir rakstrarjáttan, skulu vera liður í vanliga rakstrarvirkseminum, og mugu sostatt ikki stava frá skattum o.t.

**§ 6.** Endamálið við rakstrarjáttanini skal vera lýst í viðmerkingunum til játtanina, har tað somuleiðis skal vera ávísing til møguliga lóggávu á økinum.
*Stk. 2.* Fær stovnurin meira at ráða yvir, tí virksemið verður minni enn ætlað, ella tí at framdar verða stórar skynsemisbroytingar, er ikki loyvt at brúka ta hervið tøku játtanarupphæddina at betra um virksemisstigið í mun til upprunaliga ætlað við játtanini.
*Stk. 3.* Eru góðar grundgevingar fyri tí, kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum tó loyva, at tøka játtanarupphæddin verður brúkt til at betra um virksemisstigið í mun til upprunaliga ætlað við játtanini.

## Kapittul 2
## KT-verkætlanir

**§ 7.** KT-verkætlanir verða tiknar við undir rakstrarjáttan, sbrt. § 1, stk. 5. Tá talan er um størri KT-verkætlanir á 5 mió. kr. ella meira, so skulu hesar hava heimild í og fremjast sambært verklagslóg.

## Kapittul 3
## Gjøld og avgjøld ásett til ávís endamál

**§ 8.** Gjøld og avgjøld til ávís endamál, jbr. § 1, stk. 3, skulu, um annað ikki er galdandi, ásetast soleiðis, at í mesta lagi fullur dekningur er fyri tær útreiðslur, sum kunnu verða roknaðar til ávísa virksemið, sum gjøld ella avgjøld verða roknað fyri soleiðis, at meðal langtíðarkostnaðurin verður fíggjaður, sbrt. § 20.

## Kapittul 4
## Lønar- og pensjónsviðurskifti

**§ 9.** Í viðmerkingunum til fíggjarlógina verður fyri hvørja høvuðskontu undir rakstrarjáttan ásettur ein lønarkarmur, svarandi til standardkontu 11, sum er mesta upphæddin fyri lønarútreiðslurnar samanlagt.
*Stk. 2.* Eru góðar grundgevingar fyri tí, kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum tó loyva, at farið verður uppum lønarkarmin treytað av, at samlaða játtanin heldur.

**§ 10.** Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal góðkenna allar setanir og umflokkingar av tænastumannastørvum í lønarflokki 37 ella hægri. Hetta er eisini galdandi fyri aðrar setanir og umflokkingar, har lønarstigið er samsvarandi lønarflokki 37 ella hægri hjá tænastumonnum landsins.
*Stk. 2.* Hóast eitt starv er flokkað við serligari góðkenning, kann starvið verða sett í lægri lønarflokk.
*Stk. 3.* Í viðmerkingunum til rakstrarjáttan skal vera eitt starvsfólkayvirlit, sum vísir lønarsamtøl og tal av ársverkum, sbrt. § 16, stk. 3, í lógini.
*Stk. 4.* Eitt ársverk verður allýst sum tímatalið eitt starvsfólk eftir viðkomandi sáttmála skal arbeiða í einum fulltíðarstarvi í eitt ár. Tá ið ársverkini verða roknað sum brøkur, er teljarin samtalið fyri allar tímar arbeitt verður eftir viðkomandi sáttmála bæði hjá fast- og tímaløntum. Nevnarin er tímatalið eitt starvsfólk eftir viðkomandi sáttmála skal arbeiða í einum fulltíðarstarvi.

**§ 11.** Stovnar, sum hava útreiðslur til tænastumannalønir, skulu útreiðsluføra eitt pensjónsavsetingargjald. Gjaldið er 15 % av pensjónsgevandi lønini. Gjaldið verður roknað sum ein partur av lønarútreiðslunum og verður tikið við sum samsvarandi inntøka undir játtanini til tænastumannapensjónir.

## Kapittul 5
## Landsfyritøkur

**§ 12.** Ber virksemið handilsligan dám, kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum loyva, at tað verður framt sambært ræðisreglum, galdandi fyri landsfyritøkur, sbrt. § 18 í lógini.

**§ 13.** Loyvi at reka landsfyritøku skal verða greitt í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið, sbrt. § 21 í lógini.
*Stk. 2.* Í viðmerkingunum skal somuleiðis verða greitt nærri frá landsfyritøkuni, herundir bygnað, slag av virksemi, og hvussu stórt virksemið ætlandi verður.

**§ 14.** Reglurnar um landsfyritøkur verða nýttar, tá virksemið hjá almennum stovni í høvuðsheitum er vinnuligt, og tað tí er skilabest at geva leiðsluni størri møguleikar til at laga virksemið eftir marknaðarviðurskiftunum.

**§ 15.** Tá talan er um landsfyritøkur eru somu ásetingar galdandi sum fyri rakstrarjáttan. Tó er kravið um lønarkarm sbrt. § 9 ikki galdandi.

**§ 16.** Landsfyritøkur verða settar upp á serskildum høvuðskontum.

## Kapittul 6
## Inntøkufíggjað virksemi

**§ 17.** Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kann loyva, at inntøkufíggjað virksemi kann verða framt undir rakstrarjáttan, sbrt. § 19 í lógini.

**§ 18.** Loyvi til inntøkufíggjað virksemi skal verða greitt í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið, sbrt. § 21 í lógini.
*Stk. 2.* Í viðmerkingunum skal somuleiðis verða greitt nærri frá um inntøkufíggjaða virksemið, herundir bygnað, slag av virksemi, hvussu stórt virksemið ætlandi verður og um skilnaðin frá vanliga virkseminum á stovninum.

**§ 19.** Loyvi til inntøkufíggjað virksemi er treytað av, at:
1) Viðskiftafólkin ikki hava nakra skyldu at taka móti vøruni ella tænastuni,
2) Stovnurin skal kunna skilja virksemið, sum ætlanin er at hava sum inntøkufíggjað virksemi, frá øðrum uppgávum hjá stovninum, og
3) Tað inntøkufíggjaða virksemið skal verða sprottið náttúrliga úr vanliga virksemi stovnsins.

**§ 20.** Søluprísurin á vørum og tænastum skal ásetast soleiðis, at hann ikki er kappingaravlagandi mótvegis privatum og almennum útbjóðarum, og soleiðis at meðal langtíðarkostnaðurin verður fíggjaður.
*Stk. 2.* Meðal langtíðarkostnaður er tað, sum tað í meðal kostar at framleiða ávísa vøru ella tænastu gjøgnum eitt longri tíðarskeið. Uppí kostnaðin verður roknað:
1) Beinleiðis útreiðslur, tvs. útreiðslur sum beinleiðis eru knýttar at framleiðsluni av vøruni ella tænastuni (t.d. løn, tilfar og uttanhýsis tænastur).
2) Óbeinleiðis útreiðslur, tvs. útreiðslur sum ikki beinleiðis kunnu knýtast at vøruni ella tænastuni, men sum kunnu roknast við grundarlagi í útreiðslum, stovnurin hevur yvir eitt tíðarskeið (t.d. høli, skrivstovulutir, KT og leiðsla)
3) Aðrar óbeinleiðis útreiðslur, sum kunnu vera rakstrarútreiðslur frá farnum árum ella útreiðslur, sum eru tiknar við aðrastaðni á fíggjarlógini (t.d. avskrivingar og kapitalkostnaður).

**§ 21.** Hevur inntøkufíggjað virksemi einkarrætt ella støðan líkist einkarrætti, so kann prísurin fyri vøruna ella tænastuna ikki vera hægri enn miðal langtíðarkostnaðurin.

**§ 22.** Inntøkufíggjað virksemi verður sett upp á serskildari undirkontu undir rakstrarjáttan.

**§ 23.** Inntøkufíggjað virksemi skal í størst møguligan mun javnviga ella geva yvirskot.
*Stk. 2.* Yvirskot kann verða nýtt til vanliga virksemið, og undirskot verður fíggjað av vanliga virkseminum.

**§ 24.** Vísir roknskapurin fyri inntøkufíggjað virksemi undirskot í minst 3 ár, kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum gera av at niðurleggja virksemið.

**§ 25.** Vørur og tænastur, sum verða nýttar bæði av inntøkufíggjaða virkseminum og vanliga virkseminum, skulu skrásetast undir ávikavist inntøkufíggjað virksemi og vanligt virksemi samsvarandi veruligu nýtsluni.

**§ 26.** Lønarútreiðslur til starvsfólk, sum arbeiða bæði í inntøkufíggjaða virkseminum og vanliga virkseminum, verða skrásettar alt eftir, hvussu stóran part starvsfólkini hava arbeitt ávikavist í inntøkufíggjaða virkseminum og vanliga virkseminum.

**§ 27.** Fyri inntøkufíggjað virksemi er kravið um lønarkarm sbrt. § 9 ikki galdandi, tó eru hesar avmarkingar galdandi:

1) Starvsfólk kunnu bara verða sett, um útreiðslurnar av hesum verða fíggjaðar av inntøkufíggjaða virkseminum. Um neyðugt skal starvssetanin vera tíðar- ella uppgávuavmarkað.
2) Tænastumenn kunnu ikki verða settir við beinleiðis tilknýti til inntøkufíggjað virksemi.
3) Starvsfólk, sum verða sett beinleiðis til inntøkufíggjað virksemi, verða sett eftir sáttmálatreytunum, sum eru galdandi á økinum.

## Kapittul 7
## Stuðulsfíggjað virksemi

**§ 28.** Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kann loyva, at stuðulsfíggjað virksemi kann verða framt undir rakstrarjáttan, sbrt. § 20 í lógini.

**§ 29.** Loyvi til stuðulsfíggjað virksemi skal verða greitt í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið, sbrt. § 21 í lógini.
*Stk. 2.* Í viðmerkingunum skal somuleiðis verða greitt neyvari frá stuðulsfíggjaða virkseminum, herundir bygnað, slag av virksemi, hvussu stórt virksemið ætlandi verður og skilnaðinum mótvegis vanliga virkseminum á stovninum.

**§ 30.** Loyvi til stuðulsfíggjað virksemi er treytað av, at:

1) Virksemið ikki er handilsligt,
2) Stovnurin skal kunna skilja framleiðsluna, sum ætlanin er at hava sum stuðulsfíggjað virksemi, frá øðrum uppgávum hjá stovninum, og
3) Tað stuðulsfíggjaða virksemið skal verða sprottið náttúrliga úr vanliga virksemi stovnsins.

**§ 31.** Stuðulsfíggjað virksemi verður sett upp á serskildari undirkontu undir rakstrarjáttan.

**§ 32.** Bindandi tilsøgn um fígging skal vera fingin til vega, áðrenn farið verður undir stuðulsfíggjað virksemi.
*Stk. 2.* Er talan um fígging frá privatum veitarum, so skal stuðulin helst verða goldin, áðrenn farið verður undir virksemið. Verður í undantaksføri goldið afturút, so skal stuðulin verða goldin samsvarandi útreiðslugongdini.

**§ 33.** Vørur og tænastur, sum verða nýttar bæði av stuðulsfíggjaða virkseminum og vanliga virkseminum, skulu skrásetast undir ávikavist stuðulsfíggjað virksemi og vanligt virksemi samsvarandi veruligu nýtsluni.

**§ 34.** Lønarútreiðslur til starvsfólk, sum arbeiða bæði í stuðulsfíggjaða virkseminum og vanliga virkseminum, verða skrásettar alt eftir, hvussu stóran part starvsfólkini hava arbeitt ávikavist í stuðulsfíggjaða virkseminum og vanliga virkseminum.

**§ 35.** Fyri stuðulsfíggjað virksemi er kravið um lønarkarm sbrt. § 9 ikki galdandi, tó eru hesar avmarkingar:

1) Starvsfólk kunnu bert setast, um útreiðslurnar av hesum verða fíggjaðar av stuðulsfíggjaða virkseminum. Um neyðugt skal starvssetanin vera tíðar- ella uppgávuavmarkað.
2) Tænastumenn kunnu ikki setast við beinleiðis tilknýti til stuðulsfíggjað virksemi.
3) Starvsfólk, sum verða sett beinleiðis til stuðulsfíggjað virksemi, verða sett eftir vanligu sáttmálatreytunum, sum eru galdandi á økinum.

## Kapittul 8
## Gildiskoma

**§ 36.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. juli 2011
*Stk. 2.* Tó fær § 11 ikki gildi fyrrenn seinni við serskildari kunngerð.

Fíggjarmálaráðið, 7. juni 2011

**Aksel V. Johannesen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Atli Suni Leo

Nr. 85 8. juni 2011

# Kunngerð
# um
# veiðu eftir makreli við fiskiførum undi føroyskum flaggi í 2011

Við heimild í § 9, stk. 1, nr. 2, 3, 4 og 7, § 9, stk. 2, § 32, stk. 1 og § 40, stk. 2 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, við seinni broytingum, verður ásett:

*Virkisøki*

**§ 1.** Kunngerðin fevnir um fiskiskap eftir makreli (Scomber scombrus) við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2011, sbr. tó § 9.

*Heildarkvota og útlutan*

**§ 2.** Føroyska heildarkvotan av makreli í 2011 verður sett til 150.000 tons.
*Stk. 2.* Ikki fiskað kvota frá 2010 á 3.250 tons verður løgd afturat kvotuni í stk. 1.

**§ 3.** Av heildarkvotuni, sbrt. § 2, kunnu fiskifør undir føroyskum flaggi fiska 126.450 tons av makreli, sbr. tó § 9.

**§ 4.** Av kvotuni til fiskifør undir føroyskum flaggi, sbrt. § 3, verða 5.000 tons sett av til vísindaligar kanningar og granskingarroyndir eftir tilmæli frá Havstovuni.

**§ 5.** Av kvotuni, sbrt. § 3, verða 35.000 tons latin eigarum av fiskiførum undir føroyskum flaggi, sum í 2009 høvdu rætt til fiskiloyvi, sbrt. § 5, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, at fiska makrel í føroyskum sjógvi. Kvotan verður latin sum egin árskvota.

**§ 6.** Av kvotuni, sbrt. § 3, verða 66.450 tons latin móti avgjaldi.
*Stk. 2.* 63.450 tons av kvotuni í stk. 1 verða latin til hesar bólkar av fiskiførum:
1) 22.000 tons verða latin eigarum av fiskiførum, sum í 2009 høvdu rætt til fiskiloyvi, sbrt. § 5, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, at fiska makrel í føroyskum sjógvi. Kvotan verður latin sum egin árskvota.
2) 41.450 tons verða latin eigarum av øðrum fiskiførum undir føroyskum flaggi enn teimum, sum eru fevnd av nr. 1. Kvotan verður latin sum felagskvota við hámarki. Hámarkið verður ásett í fiskiloyvið, og verður 4.000 tons til hvørt skipið.

*Stk. 3.* 3.000 tons av kvotuni í stk. 1 verða sett av til landsstýrismannin at ráða yvir at nýta til vísindaligar kanningar og granskingarroyndir eftir tilmæli frá Havstovuni. Verður kvotan ikki nýtt til hetta endamál, verður kvotan løgd afturat kvotuni í stk. 2, nr. 1.
*Stk. 4.* Fiskiskapurin eftir tí í stk. 2, nr. 2 nevndu kvotu kann byrja 20. juni 2011, og í mesta lagi 20.725 tons kunnu fiskast fyri 20. juli 2011.
*Stk. 5.* Um líkindi eru fyri, at felagskvotan við hámarki í stk. 2, nr. 2 ikki verður fullnýtt, kann landsstýrismaðurin hækka ella taka burtur ásetta hámarkið.

*Kvota keypt á uppboði*

**§ 7.** Av kvotuni, sbrt. § 3, verður rætturin til at veiða 20.000 tons av makreli seldur á uppboðssølu eftir ásetingunum í § 3 í løgtingslóg um serstakar treytir fyri makrelfiskiskapi í 2011.

*Avgjald*

**§ 8.** Kvotur, latnar sbrt. § 6 í hesi kunngerð, verða, sbrt. § 2 í løgtingslóg um serstakar treytir fyri makrelfiskiskapi í 2011, álagdar eitt avgjald á 0,25 kr. fyri hvørt avreitt kilo í rundari vekt.
*Stk. 2.* Gjaldið, sbrt. stk. 1, fellur til gjaldingar, so hvørt veiðan verður avreidd eftir ásetingunum í løgtingslóg um serstakar treytir fyri makrelfiskiskapi í 2011.
*Stk. 3.* Við umrokning av fiski og fiskaúrdráttum til runda vekt, tá hesin er viðgjørdur, skulu teir í fylgiskjali 1 ásettu umrokningarfaktorar nýtast.

**§ 9.** Landsstýrismaðurin kann, sbrt. § 8 í løgtingslóg um serstakar treytir fyri makrelfiskiskapi í 2011, loyva eigara av fiskifari undir føroyskum flaggi at fiska makrel í 2011 við fiskifari undir fremmandum flaggi, tá tað skal nýtast fyri fiskifar undir føroyskum flaggi, sum orsakað av bráðfeingis óhappi ikki kann fara til fiskiskap.

*Fiskiloyvi*

**§ 10.** Fiskiskapur eftir makreli kann bert fara fram við fiskiførum, sum eftir umsókn hava fingið fiskiloyvi frá Fiskimálaráðnum til slíkan fiskiskap.
*Stk. 2.* Fiskiloyvi til kvotur latnar sbrt. §§ 4-6 og kvotur frá uppboði, sbrt. § 7, verða útskrivað fyri seg.
*Stk. 3.* Í fiskiloyvið verða settar nærri treytir fyri fiskiskapin sbrt. § 11, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

*Partroling*

**§ 11.** Partroling er loyvd. Hjá fiskiførum, sum fiska av kvotu sbrt. § 6 í hesi kunngerð, er partroling tó bert loyvd millum fiskifør í sama bólki sbrt. § 6, stk. 1.

*Hjáveiða*

**§ 12.** Hjá fiskiførum, sum í 2011 hava loyvi at fiska annan uppsjóvarfisk, sum er undir kvotuskipan, er hjáveiða av hesum fiskasløgum loyvd í beinleiðis fiskiskapi eftir makreli. Hjáveiðan verður roknað av eginkvotuni hjá viðkomandi fiskifari ella av felagskvotuni hjá viðkomandi fiskiførum.
*Stk. 2.* Hjá fiskiførum, sbrt. stk. 1, har kvota av øðrum uppsjóvarfiski er uppfiskað, og hjá fiskiførum, sum ikki eru fevnd av stk.1, kann hjáveiða av øðrum uppsjóvarfiski, sum er undir kvotuskipan, í mesta lagi vera 5 % av samlaðu vektini av veiðuni fyri túrin.

**§ 13.** Samlaða hjáveiðan av fiskasløgunum toskur, hýsa, upsi og kongafiskur má hvørki fyri hvørt hál ella fyri túrin vera meiri enn 2 % av samlaðu veiðuni fyri túrin ella hálið.
*Stk. 2.* Skiparin hevur skyldu at boða Fiskiveiðieftirlitinum frá, um íblandingin av fiskasløgunum toskur, hýsa, upsi og kongafiskur er størri enn 2 % av vektini í hvørjum háli ella kasti.

**§ 14.** Fiskiveiðieftirlitið kann, við heimild í § 35, stk. 3 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, áseta bráðfeingis veiðibann, har hjáveiðan er meira enn ásetta hámarkið.

*Undirmátsmakrelur*

**§ 15.** Veiðan av undirmátsmakreli má ikki vera meira enn 10 % av samlaðu vektini av veiðuni fyri túrin.
*Stk. 2.* Makrelur, ið er undir 30 cm, mátaður fremst úr høvdinum til aftast á stertinum, tá hann er strektur, er undirmátsmakrelur.

*Meskar*

**§ 16.** Tá makrelur verður veiddur við uppsjóvartroli, mugu meskarnir ikki fara niður um 35 mm.

*Útblaking*

**§ 17.** Tað er ikki loyvt at blaka ella sleppa veiðu útaftur.

*Ymiskar ásetingar um útgerð umborð*

**§ 18**. Gloppið millum rimarnar í pumpukassanum kann í mesta lagi vera 10 mm. Rimarnar skulu vera sveisaðar fastar. Um pumpukassin hevur hol í staðin fyri rimar, skal tvørmátið á holunum ikki fara upp um 10 mm. Hol í sliskuni, áðrenn pumpukassan, mugu ikki vera meira enn 15 mm í tvørmát.

**§ 19.** Skip mugu ikki vera innrættað soleiðis, at møguligt er at tøma fisk úr tangunum yvirborð undir vatnlinjuni.

**§ 20.** Fiskiveiðieftirlitið kann krevja at fáa tekningar frá skipum, sum vísa, hvussu fongurin verður hagreiddur umborð og tømingarmøguleikar. Skip skulu til eina og hvørja tíð hava avrit av hesum tekningum.

**§ 21.** Fiskifør, sum ikki frysta veiðuna umborð, hava ikki loyvi at hava ella brúka sjálvvirkandi støddarskiljarar umborð. Um veiðan verður fryst ella virkað umborð, skal hetta verða gjørt beint eftir støddarskiljing.

*Eygleiðari*

**§ 22.** Sbrt. § 36, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap og § 6 í løgtingslóg um serstakar treytir fyri makrelfiskiskapi í 2011 kann landsstýrismaðurin krevja, at eygleiðari er umborð á fiskiførum og førum, sum taka ímóti veiðu. Fiskiveiðieftirlitið ger av, um eygleiðari skal vera umborð á fiskiførum, ið fiska sambært hesi kunngerð og førum, sum taka ímóti veiðu sambært hesi kunngerð. Fiskifarið, ella farið, sum tekur ímóti veiðu, ber útreiðslurnar til kost og uppihald hjá eygleiðara, umframt lønarkostnað.

*Sýni*

**§ 23.** Fiskifør, ið fiska sambært hesi kunngerð, kunnu verða áløgd at taka sýni av veiðuni.

**§ 24.** Fiskifør, ið fiska sambært hesi kunngerð, kunnu verða áløgd at gera kanningar av veiðuni, herundir av stødd, vekt og dygd.

*Fráboðanir*

**§ 25.** Áðrenn fiskifar byrjar fiskiskap eftir makreli, skal fráboðan sendast Fiskiveiðieftirlitinum um, hvørjum fiskiloyvi fiskað verður eftir.

*Umskiping o.a.*

**§ 26.** Eftir umsókn verður loyvt fiskiførum og øðrum førum undir føroyskum flaggi at umskipa, lata og taka

ímóti veiðu, sum er fiskað sambært hesi kunngerð.
*Stk. 2.* Í loyvið, sbrt. stk. 1, kunnu ásetast treytir um fráboðanir til hagfrøðilig og eftirlitsendamál, herundir um dagbøkur, og upplýsingar um veiðu, avreiðingar, fiskiskap og vektarseðlar.

*Revsing*

**§ 27.** Brot á § 10, stk. 1, § 11, 2. pkt., § 12, stk. 2, § 13, stk. 1 og stk. 2, 1. pkt., § 15, stk. 1, §§ 16-19, § 20, 2. pkt., § 21 og § 25 verða revsað við bót, um ikki harðari revsing er ásett eftir aðrari lóg. Á sama hátt verður tann revsaður, sum ikki fylgir boðum sbrt. §§ 23 og 24, umskipar o.a. uttan loyvi, sbrt. § 26, stk.1, ella ikki fylgir treytum ásettar við heimild í § 26, stk. 2. Um brot er framt av partafelag, smápartafelag, lutafelag ella líknandi, kann felagið sum slíkt, sbrt. § 40, stk. 3 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, verða revsað við bót.
*Stk. 2.* Sbrt. § 45 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap kann Fiskiveiðieftirlitið beinanvegin taka inn fiskiloyvi, um skipari á fiskifari er skuldsettur fyri brot á hesa kunngerð, ella um fiskifarið ikki hevur hildið seg til treytir ásettar í fiskiloyvinum sambært hesi kunngerð. Fiskiloyvi kann verða tikið aftur upp til 4 vikur hvørja ferð.

*Gildistíð*

**§ 28.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2011.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 31 frá 4. mai 2011 um veiðu eftir makreli við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2011.

Fiskimálaráðið, 8. juni 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

Fylgiskjal 1

Umrokningarfaktorar fyri makrel 2011

| **Fiskaslag** | **Kruvdur, við høvdi** | **Kruvdur, uttan høvd** | **Kruvdur, skráskorin** | **Japan-skorin** | **Flak við skræðu & beini** | **Flak, uttan skræðu, við beini** | **Flak við skræðu uttan bein** | **Flak uttan skræðu & bein** | **Flak við skræðu uttan ugga** | **Flak uttan skræðu & ugga** | **Fiskamjøl** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Makrelur | 1,15 | 1,3 | | | 2,6 | 2,6 | | 2,6 | | | 5,216 |

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705